Fíggjarleiðari/ bókhaldari

Søkt verður eftir fíggjarleiðara/bókhaldara til at byrja skjótast gjørligt.

Starvið umfatar alt fyrisitingarligt arbeiði innan fíggjarstýring, bókhald og annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Viðkomandi skal hava útbúgving og royndir innan fíggjarstýring og bókhald, skal hava góðan teldukunnleika og góð samstarvsevni.

Løn sambært avtalu.

Umsókn við prógvum og upplýsingum um royndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2004 og skulu stílast til:

P/f Demich
Stiðjagøta 2 · Postboks 378
FO-100 Tórshavn

Leiðari

Barnagarðurin Sýslan og Frítíðarskúlin

søkir eftir leiðara við námsfrøðiligari útbúgving, at arbeiða 40 tímar um vikuna frá 1. mai 2004, lønarstig 22/28.

Barnagarðurin er normeraður til 36 børn við 3 stovum, 12 børnum og 2 vaksnum á hvørjari stovu.

Frítíðarskúlin er normeraður til 25 børn við einum deildarleiðara og 2 hjálparfólkum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at ringja til leiðaran, Súsannu á Stongum, tlf. 223423 ella 332948.

Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 21. apríl 2004.

Stýrið fyri barnagarðin Sýslan
Sólvá Thomassen, formaður
FO-380 Sørvágur

Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Sosialurin 341800

Nordjobb

Nordjobb í Føroyum søkir eftir kamar, íbúðum og húsum í havn í tíðarskeiðnum 1. mai–31. august. Øll tilboð frá einum mánað til alt tíðarskeið hava áhuga.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 25 74 06.

Nordjobb er ein Norðurlendsk verkætlan fyri ung millum 18 og 26 ár, sum hevur til endamáls at býta um arbeiðskraft í norðurlondum.
Nordjobb er fíggjað av Nordisk Ministerråd og verður umsitið av høvuðsskrivstovuni hjá Norrønafeløgunum í Svoríki.
Fleiri upplýsingar um Nordjobb kunnu fáast á www.nordjobb.net

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin · tlf 345600
tf@ trygging.fo · www.trygging.fo

Alt virksemið savnað á Kongabrúnni

Nú umbyggingin er liðug, verður alt virksemið í Tórshavn savnað í hølum okkara á Kongabrúnni.

Týsdagin 13. apríl 2004 verður nýggja og umbygda avgreiðslan á Kongabrúnni latin upp, og samstundis verður avgreiðslan á Hálsi stongd.

Havnar Fimleikafelag
á Stórheyggi, Postrúm 3145, 110 Tórshavn
tlf. 314851, t-postur hfimleik@post.olivant.fo

SUMMARFIMLEIKUR

Kom í form byrjar aftur mikudagin 14. apríl og hildið verður á til mikudagin 26. mai 2004.
Vit eru á Stórheyggi

mánadag kl. 17.45 - 19.00
mikudag kl. 17.45 - 19.00

Eingin tilmelding Kostnaður kr. 30,- fyri hvørja ferð

Sosialurin

Avloysari

fyri leiðaran á Føroya Barnaheimi

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðaran á Føroya Barnaheimi at byrja skjótast tilber.

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur. Barnaheimið er býtt í tvær deildir, Ungdómsdeildina og Familjudeildina. Á Ungdómsdeildini búgva vanliga 6-7 børn. Starvsfólkini eru 8 umframt 1 hálva tíð.

Á Familjudeildini kunnu búgva upp til 4 familjur í styttri tíðarskeið. Á deildini starvast 9 starvsfólk.

Umframt leiðaran eru harafturat skrivstovuhjálp og húsavørður, ið starvast hálva tíð.

Føroya Barnaheim er ein stovnur, sum við umsorgan, eygleiðing og viðgerð skal virka fyri at skapa trygg og mennandi kor fyri børn, ung og foreldur, meðan tey eru á heiminum. Hetta skal gerast í tøttum samstarvi við familjuna, barnavernd, stovnar og fakfólk annars við tí endamáli at geva innskrivandi barnavernd betri møguleikar at meta um støðuna hjá barninum/familjuni og møgulig framhaldandi hjálpartiltøk.

Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Týðandi partur av starvinum sum leiðari er samstarv við avvarðandi, barnaverndir, myndugleikar, skúla, ansingarstovnar, heilsuverk umframt fakfólk og onnur, ið varða av barninum/familjuni.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góð leiðara- og samstarvsevni, hevur áræði, dugir at samstarva við ymisku fakbólkarnar og at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri tey, ið búgva á heiminum, og starvsfólkini.

Til starvið krevst útbúgving sum sálarfrøðingur, pedagogur, sosialráðgevi við eftirútbúgving innan leiðslu og familjuterapi ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Starvið er tíðaravmarkað og í longsta lagi til komandi løgtingsval.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríðu Patursson á telefon 319727 eftir kl.17.00.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmælum, v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 22. apríl 2004.

Stýrið fyri Føroya Barnaheim
att. Fríða Patursson
P. við Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn

Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

HONDA CIVIC
Svartur Honda Civic frá '95 við 16"sportfelgum, sóltak og senkaður, bílurin sær væl út!
Tlf. 226744

JAPANSKUR BILUR
ynskist til keyps max. 19.000 kr. Má hava verið sýnaður, árg. 91-98.
Tlf. 224910

EYKALUTIR
til Ford Sierra árg. 88 til sølu.
Tlf. 250133

EYKALUTIR
til Toyota Corolla 1.3 árg. 88 til sølu.
Tlf. 321088

COROLLA 1.3
til sølu, árg. 92, nýsýnaður.
Tlf. 511990

TIL SØLU
4 alu-felgur 5 hol, 5 x 100 millum boltarnar, dekk 205/55-16. Passa til Carina E, Avensis. Sera bíliga til sølu.
Tlf. 254266

HEILÁRSDEKK
4 heilársdekk til sølu, stødd 185/70-14" - 2 mrk. gev boð.
Tlf. 259335

TIL SØLU
Mitsubishi Lancer frá 1987. Hevur plátur og koyrir fínt. Vælegnaður til eykalutir. Prísuppskot kr. 3000.
Tlf. 757322

GÓÐ HEILÁRSDEKK
175/65-14 til sølu fyri 1.000,- kr.
Tlf. 250133

CITROEN BX 1.9 GTI
frá 86, í góðum standi, manglar ein hondbremsukápil. Prísuppskot 12.000 kr.
Tlf. 721882, Jóhann

TIL SØLU
Silvurgráur Ford Escort st.car 1.8 TD, árg. aug. 98, hevur aircondition, el-rútar, el-spegl, hita í setrunum og forrútinum. Er í sera góðum standi.
Tlf. 211444

OPEL ASTRA
árg. 98 til sølu, koyrt 50.000 km.
Tlf. 319699

MAZDA 323
til sølu, árg. 91, nýsýnaður, 15" sportfelgur v/ heilársdekkum, sær væl út og er í góðum standi.
Tlf. 256801

TOYOTA COROLLA
árg. 89, koyrir av tí besta. Hevur powerstýring. Er brúktur til arbeiðsbil, selist vegna keyp av størri bili. Prísuppskot 5.000,-
Tlf. 372805

TIL SØLU
Nýggj dekk, ymiskar støddir.
Tlf. 218778

TIL SØLU
Nógvir eykalutir til Ford Escort st.car árg. 96.
Tlf. 218778

TIL SØLU
Opel Vectra árg. 08/97, 90.000 km hevur antispin, fjarstýrd sentrallás, summar- og pikadekk, spildurnýggj til sølu.
Tlf. 259270

ALU-FELGUR TIL SØLU
15" felgur, 4 hol, 115 mm millum hjulboltar. Prísur: 800 kr.
Tlf. 224180

HEILÁRSDEKK
Nýggj heilársdekk á orginalum felgum til Opel Astra til sølu. Stødd 165-70-13. kr. 1500.
Tlf 318283. Mobil 223982

TOYOTA AVENSIS 1.8 TIL SØLU
vegna keyp av minni bili, árg. mai 03, koyrt 10.000 km.
Tlf. 222684

TIL SØLU
Honda Civic, árg. 92, el-rútar, sentrallás, el-spegl, powerstýring, air-con, sportfelgur, 32.000 kr.
Tlf. 267315

BMW TIL SØLU
Grønur BMW 320 D, 167 HK, árg. 01.09.99 ikki innfluttur, til sølu.
Tlf. 315511/223311

CAMP-LET
teltvognur til sølu fyri kr. 4.000,-
Tlf. 211102

SPORTFELGUR
16" sportfelgur við 205/50 x 16 radialdekk, alt sær út sum nýtt, til sølu, hevur 4 hol,passar til Nissan Primera, er brúkt eitt summar. Áhugað ring
tlf. 443096

YNSKIST
Mazda 323, helst nýsýnaður og í góðum standi, árg. 88-94.
Tlf. 211034 eftir kl. 17

OPEL OMEGA 1.8cc TIL SØLU
sum eykalutir, koyrt 138.000 km, ring og gev eitt boð.
Tlf. 503715

EYKALUTIR
til Mazda, árg. 87, model BF, til sølu.
Tlf. 503716

TIL SØLU
Takboylar passa m.a. til Opel Astra, bíliga til sølu.
Tlf. 253273/319888

TIL SØLU
Fýra vetrardekk 175/70-13
Tlf. 375298/228398

HONDA ACORD
uttan plátur til sølu fyri 3000 kr
748446

ESCORT/MONDEO
4 stk. alu felgur 15" við dekkum, 2 195x55x15, 2 205x50x15, til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 211745

SAAB 9-3
árg. 27.7.99 til sølu um hóskandi boð fæst. Koyrt 65.000 km, er í sera góðum standi.
Tlf. 509353

ELLISAKFAR
Morris Mascot, árg. 76, til sølu.
Tlf. 223498 ella 443058

4 NÝGGJ SUMMARDEKK
175/65R - 14, til sølu.
Tlf. 315811

CITROEN XANTIA 1.9 TD
árg. 10/95, koyrt 125.000 km, sýnaður 24.9.03. Hevur el rútar framman. Nýggj pikadekk og dekk á felgum og takboylar fylgja við. Bíliga til sølu.
Tlf. 228021

4 SPORTSFELGUR
v/ 4 holum, góð summardekk eru á, 195/50R 15'', til sølu fyri 3.000 kr. Passa til Ford.
Tlf. 503677

VW GOLF
árg 90 til sølu.
Tlf. 374059

BMW 525 TDS
Ein motorur til BMW 525 TDS til sølu. Hevur koyrt 250.000 km. Aðrir lutir til BMW E34 seriuna eisini til sølu.
216409

Arbeiði

REINGERINGSHJÁLP
Søkt verður eftir reingeringshjálp eina ferð um vikuna.
Tlf. 312619

SØKIR KJANS
50 ára gamal íslendingar, sum býr í Føroyum, søkir kjans við føroyskum fiskiskipi, útróðrarbáti ella farmaskipi. Eg havi siglt í 30 ár, bæði við trolara, línuskipi og útróðrarbáti. Eg havi eisini siglt sum kokkur.
Tlf. 503297

FLISEARBEJDE
Mindre indedørs flisearbejde udføres.
Tlf. 228058

ER TAÐ NAKAR
sum hevur brúk fyri reingerð, so ring til mín. Eg eri ein tilkomin kvinna og búgvi í Miðvági.
Tlf. 508850

Barnaútgerð

BRIO KOYRISTÓLUR
til sølu fyri 2800 kr. nýprísur er 4800 kr. Stólurin er næstan ikki brúktur. Hevur lufthjul og er myrkabláur.
Tlf. 261166

EITT LAMBSSKINN
til koyristól ella barnavogn til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 322850

KOYRISTÓLUR
við kalesju til sølu fyri 1.000,- kr.
Tlf. 322850

TIL SØLU
Ein Roscane kombistólur v/ lufthjólum og koyriposa 1.800 kr. Ein tremmusong v. springmadrassu 400 kr.
Tlf. 456053

BARNASONG
1 1/2 ára gomul, nýprísur 1.300 krónur, nú bert 600 krónur. Í sera góðum standi, sum nýggj.
Tlf. 742119

TREMMUSONG ÚR TRÆI
65 x 130 cm. Botnurin kann flytast í 4 hæddum, síðupartí flytast upp og niður, stendur á hjólum, til sølu.
Tlf. 310144

KOYRISTÓLUR
Lítið brúktur koyristólur við posa, hann er í sera góðum standi, bert 1200 kr.
Tlf. 320880 ella 226256

TIL SØLU
Træ grulvigarður við teppi til sølu.
Tlf. 441804 eftir kl. 18

TIL SØLU
Combi barnavognur BMO. Hevur regnhettu og flugunet, 1200 kr. Barnasong við tveimum madrassum, ljóst træ 750,- kr. Baðikar við borði 400,- kr.
Tlf. 267315

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Sera vælhildin av merkinum Basson, til sølu fyri 2000 kr.
Tlf. 421161/250445

Bátaútgerð

MOTORUR TIL SØLU
Ein MWM 606-6K, 485 HK, gear Finnøy G27 og skrúvuaksil.
Tlf. 723210

YNSKIST
Glastrevjabátur millum 26–30 fót við ella uttan fiskiloyvi ynskist. Alt hevur áhuga.
Tlf. 250950 ella 507311 eftir kl. 17

BÁTUR TIL SØLU
Ein útróðrarbátur, við fiskiloyvum og íslansdloyvi, í bólki 4A til sølu um hóskandi boð fæst. Báturin er yvir 120 kubikk.
Tlf. 312238

TOSKATRÁÐA VIÐ ØLLUM
Hjól, tráða, pilkur og eskja full av beitum, húkum og tilgjørdari útgerð. Væl viðfarið. Til sølu fyri 1.200,-
Tlf. 215000

PIONER JOLLA TIL SØLU
Pioner jolla við dupultum botni við 6,5 hesta Evinrude leysamotori, er til sølu.
Tlf. 373278

TIL SØLU
Ein 20 fót køli og frystikonteynari til sølu.
Tlf. 211704

Bingo

GOTT BINGO
Gott bingo verður í Pálsstovu mánakvøldið 19. apríl, kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Høvuðsvinningar á lutaseðlinum eru m.a. ein apexflogferðaseðil við Atlantic Airways og turr krov. Eisini verður Bingola. Koyring heim aftaná.
Astma- og Allergifelagið

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði, mikukvøldið 14. apríl kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

EB/STREYMUR
Árliga BINGO verður Kristi Himmalferðardag 20. mai.
EB/STREYMUR

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í skúlahøllini í Trongisvági mánadagin 26. apríl kl. 19, nærri lýst seinni.
Tvøroyrar Svimjifelag

BINGO
verður í VB-húsinum 28.4.2004.
Meinigheitshúsið í Vági

SUÐUROYINGAR
Bingo verður í Framtíðini onskvøldið 14. apríl kl. 19.30 og 5. mai kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar.
KFUM-skótarnir

GOTT
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 19. apríl kl. 19. 12 plátur 100 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

SALMONSENS
store leksikon 2. udg. 1915 i brunt læder 1-26 kr. 2.600,-
Tlf. 443402

LADEMANNS LEKSIKON
A til K fæst við at avheinta tað.
Tlf. 443237

Burturm. /funnið

FARTELEFON FUNNIN
Samsung fartelefon funnin í Havn.
Tlf. 509998

BURTURMIST
Hevur nakar funnið mína mannfólka/sílvur hálsketu, sum eg misti 20. februar, so vinarliga ring
tlf. 252623

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Einligur ungur maður ynskir íbúð, fari væl um og havi virðing fyri tí onnur eiga, max. 3.000,- í Havn ella nærhendis.
Tlf. 259335, Janus

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskist til leigu. Fari væl um og gjaldi til tiðina.
Tlf. 226262

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarlig ung kvinna søkir íbúð í Tórshavnar Kommunu. Gjaldið til tiðina og fari væl um.
Tlf. 220549

LOFTSÍBÚÐ Í HAVN
Íbúð - uml. 85 fermetrar - er til leigu frá 1. mai 2004. Køkur v. spísikróki, stova, 2 kømur, vesi/bað. Sera gott ústýni yvir Havnina. Tað er ikki loyvt at roykja ella hava húsdjór í húsinum. Prísuppskot: kr. 5.500,- (íroknað leiguna eru el og hiti). Depositum: eitt mánaðargjald. Send teldupost til
ibud_1_mai@hotmail.com

SKRIVSTOVUHØLI
í miðbýnum til leigu – 150 fermetrar.
Tlf. 315438

ÍBÚÐ YNSKIST
Eg eri einlig mamma at 4 ára gomlum barni. Vit søkja íbúð í Tórshavn. Eg havi fast arbeiði, royki ikki. Vit eru friðarligar, fara væl um og eg gjaldi rættstundis.
Tlf. 265386

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 221158/313799

ÍBÚÐ YNSKIST
til framleigu í Keypmannahavn frá 01.08.04 til 30.06.05.
Tlf. 317147/263720

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í KBH.
1 ver. møblerað íbúð við hava í Gadevang til leigu. Íbúðin liggur beint við City 2 og Høje Tåstrup st. Kostnaður 1.500 kr. um vikuna.
Tlf. 312028/215028

SKALT TÚ TIL HAVNAR
og vil búgva væl, so er møblerað íbúð til leigu, 112 fermetrar v/ øllum hentleikum, vikuskifti ella styttri tíð. 700 kr. um dagin, seingjarklæðir 50 kr.
Tlf. 218664

HÚS TIL LEIGU
Møblerað hús í Fuglafirði til leigu frá 15. mai til 1. aug. Møguleiki fyri at leiga í bæði styttri og longri tíðarskeið.
Tlf. 265044,
t-post: mss@post.olivant.fo

TÍDARAVMARKAÐ LEIGUMÁL
Stór fult møblerað íbúð við øllum hentleikum til framleigu í Havn beinanvegin fram til 1. juli 04.
Tlf. 33248045/20698045 eftir kl. 17

SETHÚS Á TVØROYRI TIL LEIGU
100 fermetra møblerað sethús á Tvøroyri til leigu. Frítt og gott útsýni. 2 stovur, køkur, wc-bað, 3 verilsir, vaskikjallari og hjallur.
Tlf. 504370/+45 61703990

ÍBÚÐ TIL LEIGU
80 fermetra ljós og góð loftsíbúð í Havn til leigu. Altan, stova, 3 kømur, køk og bað.
Tlf. 504370/+45 61703990

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Bræva skifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12^{00}, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki